


# Barnaverkætlanin

## Útboð eftir royndum verkætlanarleiðara / organisatiónsmennara til Barnaverkætlanina

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

**Útboð eftir royndum verkætlanarleiðara / organisatiónsmennara til Barnaverkætlanina**

Barna- og útbúgvingarmálaráðið lýsir við hesum útboði eftir samansettari ráðgevauppgávu og -leikluti sum verkætlanarleiðari og organisatiónsmennari av Barnaverkætlanini. Starvið er galdandi fyri tíðarskeiðið frá 1. august 2024 til 31. desember 2026 við møguleika fyri at leingja starvið í eitt ár í senn eftir hetta.

**Barnaverkætlanin**
Barnaverkætlanin er eitt ambitiøst átak, sum varð sett í gongd í mars 2023. Aftanfyri liggur ein greið visión um at betra barna- og ungdómsøkið í Føroyum. Verkætlanin tekur støði í ásannanini av, at vælferðin hjá børnum og ungum er avgerandi fyri eitt sunt og burðardygt samfelag. Við íblástri frá "íslendska leistinum" miðar verkætlanin ímóti at stovna ein meira inkluderandi og stuðlandi karm fyri børn og ung. Hetta fevnir um samskipað átøk, tillagingar av lóggávukørmum og nýggjar samstarvsleistir tvørtur um geirar.

Við virknum íkasti frá einum breiðum skara av fakfólkum á økinum og umboðum fyri Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Løgmálaráðið og Kommunufelagið kannar verkætlanin nýggjar mátar at styrkja tað góða barna- og ungdómslívið.

Í 2023 legði Barnaverkætlanin dent á at kortleggja verandi vitan um lívskorini hjá børnum og ungum. Hetta kortleggingararbeiðið heldur fram í 2024, men verður víðkað, so tað eisini fevnir um aðrar týðandi verkætlanaruppgávur. Í 2024 fer Barnaverkætlanin at vera samansett av fýra høvuðssporum við serligum undirliðum, sum tilsamans skulu tryggja, at broytingartilgongdin verður framd sum ein heildarætlan.

**Spor #1: Vitanarmenning**
Fyrsta sporið hevur til endamáls at skapa eina víðfevnda og nágreiniliga fatan av verandi viðurskiftum, avbjóðingum og møguleikum á barna- og ungdómsøkinum í Føroyum. Í sporinum verður dentur lagdur á skipaða gransking og greining, sum røkkur frá kanningum av altjóða broytingartilgongdum til gjølla eftirmeting av núverandi føroyskari lóggávu og praksis. Verkætlanararbeiðið fevnir um samstarv við føroyskar og útlendskar serfrøðingar til tess at tryggja, at umskipanararbeiðið bæði byggir á prógvfasta vitan og verður lagað til føroysk viðurskifti.

**Spor #2: Royndarverkætlaninir**
Annað sporið er ein praktiskur og nýhugsandi táttur í Barnaverkætlanini 2024. Hetta sporið er til sniðgeving, íverksetan og eftirmeting av eini røð av royndarverkætlanum (pilotum), sum miða ímóti at royna og vísa nýggjar tvørgangandi tilgongdir og loysnir í verki til tess at betra barna- og ungdómsøkið. Verkætlanirnar verða valdar út frá greiningum og eyðmerking av mest týðandi avbjóðingum og møguleikum í føroyska samfelagnum.

**Spor #3: Strategi**
Triðja sporið er hornasteinurin í langtíðararbeiðinum við at skapa framtíðarinnar barna- og ungdómstilboð í Føroyum. Miðað verður ímóti at menna eina víðfevnda og visionera strategi, sum skal leiða arbeiðið við at betra lívskorini hjá børnum og ungum næstu árini. Strategiin verður ment í eini inkluderandi og samskapandi mannagongd, har allir viðkomandi partar verða bodnir at hjálpa

til við sínum sjónarmiðum og kunnleika. Parallelt við strategiarbeiðið fáa lyklaluttakararnir í verkætlanini bjóðað viðkomandi førleikamenning í strategiskari netverksleiðslu.

**Spor #4: Verkætlanarleiðsla og -skipan**

Fjórða og seinasta sporið leggur dent á yvirskipaðu samskipanina og stýringina av Barnaverkætlanini. Sporið er avgerandi fyri at tryggja, at verkætlanarmálini verða rokkin og ressursirnir verða nýttir á hóskandi hátt.

**Verkætlanarorganisatión og arbeiðsháttur hjá Barnaverkætlanini**

Til tess at fremja Barnaverkætlanina er skipað ein verkætlanarorganisatión – ein berandi bulur (en. Backboneorganisation), – sum virkar sum miðdepil fyri samskipanina av verkætlanini. Verkætlanar-organisatiónin fær ábyrgdina av at leiða dagliga raksturin av verkætlanini, samskipa ymsu verkætlanarsporini og luttakararnar og tryggja, at verkætlanin framhaldandi fer fram eftir ætlan viðvíkjandi tíðarætlanum og fíggjarætlanum. Umframt yvirskipaðu verkætlanarstýringina verður eisini ein samskiftisstrategi ment, sum skal miðla endamálini, framstigini og úrslitini av verkætlanini munadygt til eina breiða fjøld. Hetta umfatar uppbygging av partaløgum og netverkum, umframt at hjálpa við til at uppbyggja førleikar hjá teimum luttakandi organisatiónunum. Íroknað hesum er førleikamenning, tøkniligur stuðul og at deila vitan um góðar arbeiðshættir millum partarnar.

Við heitinum "Eitt powerhús til almenna menning og innovatión" verður ein røð av verkætlanarhølum innrættað í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í Havn. "Powerhúsið" verður stovnsett sum eitt fysiskt stað, ið samsvarar við nýggjastu granskingargrundaðu innrættingarprinsippini fyri virksemisgrundað verkætlanararbeiði. Staðið verður ein savningarstaður hjá intensivu arbeiðsspurtunum, har tvørfaklig menningartoymi verða stovnað, leggja ætlanir og laga sínar greiningaruppgávur og praksisorienteraðu royndarverkætlanir til.

Barnaverkætlanin brúkar ein agilan organisatiónshátt, sum leggur seg eftir at samanseta meginreglurnar fyri veitingarfokus og fima verkætlanarleiðslu fyri at røkka framúr úrslitum. Framferðarhátturin leggur grundarlagið fyri einum dynamiskum arbeiðsumhvørvi, har tvørfakligt samstarv og fleksibilitetur er í miðdeplinum.
Veitingarfokusið í verkætlanini tryggjar, at alt virksemi og tilfeingi er rættað móti at veita ítøkilig úrslit. Veitingarfokus hevur eisini við sær eina leypandi eftirmeting og tillaging av veitingum fyri at tryggja, at tær framvegis eru viðkomandi og hava virði fyri Barnaverkætlanina.

Deilverkætlanirnar í Barnaverkætlanini verða organiseraðar í spurtar (en: sprint), sum merkir, at arbeitt verður í føstum, stuttum tíðarskeiðum, har deilúrslit verða veitt. Spurtirnir eru intensiv arbeiðstíðarskeið á vanliga 14-21 dagar. Spurtirnir gera tað møguligt at geva eina skjóta afturboðan og tillaging, soleiðis at deilverkætlanirnar kunnu verða mentar so hvørt nýggj vitan og krøv vísa seg. Spurttilgongdin fremur eisini eina mentan av støðugari betran og læring.

Yvirskipað á strategiskum støði hevur Barnaverkætlanin fingið íblástur frá eini missiónsrættaðari strategitilgongd. Hugskotið handan eina missiónsrættaðari strategi er at seta klár og raðfest mál, sum kunnu savna luttakararnar tvørturum almennar myndugleikar, vinnulív, grunnar, hægri lærustovnar og sjálvbodnar felagsskapir. Ítøkiliga hevur Barnaverkætlanin fingið íblástur fra strategiskari netverksleiðslu sum háttalagi og hugburði. Strategisk netverksleiðsla er ein tilgongd at loysa avbjóðingar og menna politikkir, sum tekur eina breiða fjøld av luttakarum við. Afturat hesum hevur Barnaverkætlanin eisini fingið íblástur frá ástøðini um «Collective Impact», sum einum møguligum framtíðar háttalagi í tilgongdini við menningarátøkum í Føroyum.

**Verkætlanarleiðara leikluturin**
Verkætlanarleiðarin er partur av einum kjarnutoymi saman við í minsta lagi einum verkætlanarsamskipara og strategiráðgeva.

Verkætlanarleiðarin hevur tað yvirskipaðu ábyrgdina av at leggja strategisku kósina fyri Barnaverkætlanina í samstarvi við stýrisbólkin fyri verkætlanini og øðrum lyklaáhugapørtum. Harumframt skal verkætlanarleiðarin fasilitera og samskipa veitingarnar hjá kjarnutoyminum í teimum ymsu verkætlanarsporunum og -toymunum. Kjarnutoymið syrgir fyri, at verkætlanarluttakararnir í ymsu menningartoymunum verða settir inn í agila arbeiðsháttin á ein hóskandi hátt. Verkætlanarleiðarin luttekur eisini í strategiskum førleikamenningarátøkum hjá verkætlanarluttakarunum í Barnaverkætlanini.

Verkætlanarleiðarin luttekur í uppbyggingini av politiskum partaløgum og fakligum netverkum. Endaliga liggur tað í leiklutinum, at verkætlanarleiðarin luttekur í menningini at mátingarskipanum fyri verkætlanina. Hetta umfatar at savna inn, greina og greiða frá um dátur fyri at spora og kunna um framgongdina í verkætlanini, sum er avgerandi fyri at tryggja gjøgnumskygni og málrættaða menning.

**Arbeiðsøki:**
- Leggja og stýra strategisku kósina fyri Barnaverkætlanina í tøttum samstarvi við stýrisbólkin og aðrar lyklaáhugapartar.
- Tryggja at alt verkætlanarvirksemi og veitingar er í samsvari við ta yvirskipaðu politisku dagskránna og málsetingina.
- Luttaka í menningini, og at fremja strategisku førleikamenningina av partnaraskaranum í verkætlanini.
- Luttaka í fasilitering og samskipan av samstarvinum millum ymisk verkætlanartoymi og aktørar. Herundir at uppbyggja og halda við líka úrslitagóð partaløg og netverk.
- Luttaka í menningini og viðlíkahaldinum av eini skipan at máta framgongdina í verkætlanini, innsavnan, greining og kunning um viðkomandi dátur.
- Luttaka í verksetingini av fimum samskapandi arbeiðsháttum í menningartoyminum.
- Luttaka í setanini av verkætlanarluttakarum til royndarverkætlanir og greiningaruppgávur.

**Førleikaar hjá verkætlanarleiðaranum**
Væntað verður, at verkætlanarleiðarin hevur fleiri førleikar:
- **Startegisk leiðsla:** Sterkar gávur til leiðslu og strategiska ráðlegging, við evnum at stýra í einari kompleksari og tvørgangandi nýskapanarverkætlan
- **Verkætlanarleiðsluroyndir**: Kann vísa á royndir við at leiða kompleksar verkætlanir, herundir at ráðleggja og verkseta
- **Greiningarevni:** Fatan av dátugreining og at skriva frágreiðingar, sum í smálutum lýsir tilgongdina at máta framgongdina í verkætlanini
- **Samskiftisevni:** Framúr munnligt og skrivligt samskifti tvørtur um ymsar áhugapartar
- **Netverk bygging:** Góð samstarvs- og netverksevni við royndum í at uppbyggja og halda viðlíka partaløg tvørturum ymsar geirar á barna- og ungdómsøkinum.
- **Agilt háttalag:** Royndir við og fatan av fimum og samskapandi (en: agilt) arbeiðsháttum og meginreglum. Royndir við at arbeiða munadygt í toymum við verkætlanarsamskiparum og agilum coachum.
- **Toymisarbeiði:** Evni at arbeiða munadygt í toymum, og at fremja eitt trygt arbeiðsumhvørvi við góðum samstarvi
- **Tillagingarevni:** Fleksibilitetur og gávur til skjótt at laga seg eftir broytingum

**Krøv til tilboðsgevara**
Kravt verður, at tilboðsgevarin hevur:

- Viðkomandi hægri útbúgving á kandidatstøði
- Minst 5 ára royndir sum verkætlanarleiðari og/ella almennur leiðari
- Hollar royndir frá strategi- og organisatiónsmenning
- Royndir frá agilari leiðslu
- Royndir við nýskapanararbeiði innan tað almenna, herundir skipan av strategiskum netverkssamstarvi millum almennar stovnar, kommunur og sjálvboðin

**Metingarstøði og krøv**
Tað vil verða vektað positivt, um tilboðsgevarin hevur innlit í barna- og ungdomsøkið og útbúgvingarskipanina í Føroyum.

Tað vil eisini verða vektað positivt, um tilboðsgevari hevur royndir við agilari verkætlanarleiðslu og/ella nýskipanararbeiði í almenna geiranum.

Endaliga verður tað vektað positivt, um tilboðsgevari hevur viðkomandi leiðsluroyndir og eftirútbúgving innan procesfasilitering, strategi-, leiðslu- og organisatiónsmenning.

Aðalráðið kann krevja, at førleikar og royndir verða skjalprógvað.

Prísur telur 50 % og dygd telur 50 %.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tilskilar sær rætt til ikki gera nýtslu av nøkrum av innkomnu tilboðunum.

**Meting av uppgávuvavi**
Tal á tímum í miðal um vikuna/mánaðin: 20-25 tímar/viku.

Í útrokningini er galdandi, at ein arbeiðsdagur er 8,0 tímar, og at eitt ársverk er 1.696 tímar. Tímaprísur skal verða grundaður á effektiva arbeiðstíð. Lægsti tímaprísur er 650 kr. Bjóðar tilboðsveitari undir 650 kr., verður tímaprísurin á 650 kr. kortini brúktur í vektingini.
Sáttmálaparturin er Barna- og útbúgvingarmálaráðið, og arbeiðsstaður er J. H. Schrøtersgøta 7, Tórshavn.

**Tíðarfreistir**

Tilboð skulu sendast til: Poulgeerth@bumr.fo í seinasta lagi hósdag tann 27. juni 2024, kl. 23:59. Miðað verður ímóti, at sáttmálin er undirskrivaður í seinasta lagi 1. august 2024.

**Útboðsgongdin er lýst í yvirlitinum niðanfyri:**

| **Dagur** | **Handling** |
|---|---|
| **Hósdag 13/6** | Útboð verður almannakunngjørt á innkeypsportalinum kl. 12.00 |
| **Hósdag 20/6** | Freist at stilla spurningar er kl. 12.00 |
| **Hósdag 27/6** | Freist at lata inn tilboð er kl. kl. 23.59 |
| **vika 27** | Viðgerð og møgulig samrøða verður frá mánadegi 1/7 til mikudag 3/7. |

| | |
|---|---|
| **vika 28** | Sáttmáli verður undirskrivaður eftir avtalu ein av døgunum mánadag 8/7 til mikudag 10/7. |
| **Hósdag 1/8** | Veitingin byrjar hósdag 1. august 2024 |

**Fakturering**
Arbeiðstímar verða skrásettir dagliga, og tíðarnýtslan verður fakturerað mánaðarliga afturút. Gjaldsfreistin er 30 dagar frá móttøku av faktura. Faktura skal innihalda hesar upplýsingar:

- Navn og bústaður
- EAN-nummar
- Fyritøka, bústaður og v-tal
- Telefon
- Tíðarskeið, arbeiðið er gjørt (t.d. januar)
- Tímatal, tímatakstur og samlað upphædd u/mvg
- Mvg
- Upphædd v/mvg
- Fakturanummar og fakturadagur
- Viðlagt yvirlit yvir tíðarskráseting eftir nærri avtalu

**Nærri kunning**
Nærri kunning um Barnaverkætlanina er á heimasíðuni:
https://www.bumr.fo/fo/arbeidsoeki/barnaverkaetlanin

Viðvíkjandi spurningum til útboðstilfar og uppgávuna ber til at seta seg í samband við:
Poul Geert Hansen, aðalstjóra,  telefon 55 50 10 eller umvegis t-post: Poulgeerth@bumr.fo.